## Nú hvørva bjarnirnar

Hvørt summar plaga millum 10 og 11 milliónir laksar at fara niðan í Fraser-ánna í kanadiska landspartinum British Columbia at gýta, men í ár komu bara umleið ein millión laksar niðan í ánna. Tað hevur fingið sera álvarssamar avleiðingar, tí laksaveiði er ein týðandi partur av tilverugrundarlagnum hjá fólkinum fram við ánni. Men tað verður helst verri enn, tí tað vísir seg nú, at tað eru munandi færri gráar og svartar bjarnir í økinum enn onnur ár. Ein bjørn etur einar 12-14 laksar um dagin, og tá eingin laksur er, noyðast bjarnirnar at leita sær aðra føði aðrastaðni, skrivar AP.



## Geir góða samvitsku

Fyrrverandi íslendski forsætisráðharrin Geir H. Haarde heldur seg ikki hava ábyrgd av, at fleiri av landsins bankum fóru av knóranum. Í einari sending í norska og svenska sjónvarpinum um vikuskiftið segði Geir H. Haarde seg hava reina samvitsku. Hann viðgekk, at hann og stjórnin kundu havt avmarkað rásarúmið hjá bankunum, men vardi seg við, at stjórnin helt seg til tað, sum hon fekk at vita frá fíggjareftirlitinum, og harafturat var bankakreppan í Íslandi ikki nakað seríslendskt fyribrigdi, men heldur partur av altjóða fíggjarkreppuni.



*Jóhan Dahl, landsstýrismaður í vinnumálum, hevur lagt stóra orku í at útvega nólsoyingum tíðarhóskandi skip. Hann hevur eisini ætlanir um at byggja nýtt skip til Nólsoyarleiðina*

# Ternuloysnin seinkað

**Miðað var í móti at seta Ternuna inn á Nólsoyarleiðini og Rituna at sigla upp á Svínoy og Fugloy 1. oktober, men tann ætlanin er seinkað**

STRANDFERÐSLA
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Undantaksloyvið hjá Másanum gekk út í august mánað og varð ikki longt. Tískil er tað nú Sildberin, sum røkir siglingina út í Svínoy og Fugloy.

Men norðoyingar lata illa at Sildberanum, og vilja hava Rituna setta í sigling skjótast gjørligt. Men teir mugu so bíða eina tíð aftrat.

– Tað verður í hvussu er ikki til 1. oktober, at Ternan og Ritan verða settar inn í nýggju ruturnar. Umsóknin um eykajáttan at umvæla skipini fyri liggur í fíggjarnevndini til viðgerðar, og áðrenn játtanin er samtykt í løgtinginum, eru pengar ikki tøkir til umvælingarnar, sigur Jóhan Dahl, landsstýrismaður í vinnumálum.

Hann roknar við, at tað fara at ganga einir tveir mánaðir frá tí at eykajáttanin er samtykt, til skipini eru klár at seta inn á Nólsoyarleiðina og á Fugloyar- og Svínoyarleiðirnar.

– Soleiðis sum tað sær út í løtuni vænti eg neyvan, at Ternan og Ritan verða settar í nýggju ruturnar fyrr enn í desember ella januar, sigur Jóhan Dahl.

### Ferjulega

Eitt anað mál, sum má loysast, áðrenn Ternan kan setast í sigling um Nólsoyarfjørð, er spurningurin um atløguupláss í Nólsoy.

Strandferðslan hevur verið í Nólsoy saman við Tórshavnar Havn at kanna viðurskiftini, og sum skilst eru samráðingar í gongd millum partarnar um, hvussu málið við ferjuleguni skal loysast.

– Tórshavnar Havn hevur víst ein positivan vilja í málinum um ferjulegu, so eg vænti, at tann spurningurin verður loystur í samráðingum millum Tórshavnar Havn og Strandferðsluna, sigur Jóhan Dahl.

Hvussu leingi tað er at seta eina ferjulegu upp ber illa til at siga, men sum skilst eigur landið eina ferjulegu, sum ikki verður nýtt í løtuni, og tí rímiliga lættliga kann takast niður og setast jupp aftur í Nólsoy.

Og tað verður neyðugt at fáa ferjulegu í Nólsoy, tí tað er langt frá haldbært at leggja reyvina at bryggjuni sum er. Tað gongur bara í bestu líkindum.

### Nýtt skip í pakkanum

Nógv hevur verið tosað um nýtt skip á Nólsoyarleiðini, og Jóhan Dahl hevur áður úttala seg um møguleikan fyri, at eitt nýtt skip verður bygt innan fyri rímiliga tíð.

– Alt er sjálvandi tengt at játtanini á fíggjarlógini, men eitt nýtt skip er við í samlaða pakkanum til fíggjarlóg fyri komandi ár, sigur landsstýrismaðurin.

Tað er av serligu játtanini upp á 100 milliónir krónur til arbeiðsskapandi tiltøk, at nýggja Nólsoyarskipið skal fíggjast.

Projekteringin av nýggjum skipi er mest sum liðug, og tað er longu rúm tíð gingin, síðani Strandferðslan presenteraði nýggja skipið fyri nólsoyigum. Nýggja Ritan krevur eisini eina ferjulegu, so hon má koma undir øllum umstøðum.

Alt er sum nevnt tengt at fíggingini, og áðrenn hon er komin upp á pláss mugu nólsoyingar brynja seg við toli.

# Mundi hent skaði

**Tá Ritan í gjárkvøldið legði at úti í Nólsoy, gleið landgongin av skipinum, og ein maður mundi enda í havinum**

ÓHAPP
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tað eru nú nakrir mánaðir síðani at nýggj landgongd varð sett upp úti í Nólsoy. Tað hevur leingi verið eitt ynski um nýggja landgongd, so at koyristólar kunnu koyra umborð og í land í Nólsoy.

Men í gjárkvøldið mundi staðist skaði av nýggju landgongdini. Landgongdin fer niður í eitt spor, men í gjárkvøldið hendi tað, at skipið fór so langt út frá keiini, at landgongdin fór úr sporinum og datt niður á fótin. Hetta hendi júst sum stýrimaðurin, Dánjal Húsgarð, var farin út á landgongdina at loysa eina ketu, sum spent er tvørtur um landgongdina.

So tá landgongdin skramblaði niður, skramblaði Dánjal Húsgarð niður við, og umborð á Rituni siga teir, at vildi illa til, endaði Dánjal Húsgarð í havinum.

Orsøkin til, at Ritan fór so langt út frá keiini er hon, at springið gerst so langt, at ilt er at fáa skipið at liggja trygt. Ein nýggjur pullartur er gjørdur at binda Rituna í, men hesin er farin, og enn er eingin nýggjur settur upp.

Manningin á Rituni sigur seg fleiri ferðir hava gjørt vart við hendan trupulleikan, men sum so ofta áður skal nærmast ein vanlukka til, áðrenn skaðin verður bøttur.

Nú fara menn frá Tórshavnar Maskinverkstaði kortini at bøta um landgongdina soleiðis, at báturin kann liggja væl longri úti frá keiini uttan at vandi skal verða fyri, at sama óhappið skal henda aftur.

Dánjal Húsgarð mátti í morgun fara til lækna at kanna seg vegna snuddin hann fekk í gjárkvøldið.



*Nýggja landgongdin gleið úr sporinum, og tað var um reppið, at Dánjal Húsgarð endaði á bláman*

*Mynd: Álvur Haraldsen*